## B36 móti FH leygardagin

Klokkan 14 leygardagin verður árligi dysturin í Atlantic-Cup kappingini millum føroysku og íslendsku meistararnar. Hetta hevur seinni árini verið ein afturvendandi dystur, og í ár eru tað B36 og FH, sum fara at dystast. Dysturin verður spældur upp á skift í Føroyum og Íslandi, og í ár skal dysturin spælast í Havn.



## Danir brúka milliónir til graslíki

Danska fótbóltssambandið fer næstu tvey árini at verða við í byggingini av 23 graslíkisvøllum kring Danmark. DBU hevur sett 10 milliónir krónur av til hetta endamál, og málið er at hava gjørt vøllirnar lidnar, áðrenn næsta ár er lokið. Vøllirnir verða bygdir í samstarvi við feløgini, og ætlanin er, at teir skulu brúkast til vetrarvenjing, tá ið grasvøllirnir eru í ringum standi ella skulu hava frið. Longu nú kunnu graslíkisvøllir brúkast til dystir í deildunum undir 2. deild, og í mai skal aðalfundurin hjá DBU gera av, um graslíki kann brúkast til dystir í teimum trimum bestu deildunum. Í vetur eru dystir í Royal League spældir á graslíki, og tað gerst alsamt meira vanligt í Danmark og aðrastaðni at brúka graslíki til dystir.

# Finaludreymurin hjá Jón Róa brast

**Eitt sjálvmál seint í dystinum gjørdi enda á AaB í hálvfinaluni í donsku steypakappingini í gjárkvøldið. Tað verður kallað ein sensatión, at Randers úr næstbestu deildini kom í steypafinaluna**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóskvøldið vóru seinnu hálvfinalurnar í donsku steypakappingini spældar. Líkt varð til, at tað skuldi gerast ein reint jútsk finala, tí Esbjerg hevði í fyrru hálvfinaluni vunnið 5-2 á Brøndby, og í hinari hálvfinaluni spældu tey bæði Randers og AaB.

Brøndby vann seinnu hálvfinaluna á Esbjerg 1-0, men tað var ikki nóg mikið til at vinna dystin samlað, og tí kom Esbjerg í finaluna.

Í hinari hálvfinaluni var føroysk luttøka, men tað endaði ikki væl. AaB skuldi á heimavølli royna at vinna ímóti Randers úr næstbestu deildini, og tað mundu tey flestu rokna við, at teir fóru at klára. Men AaB hevur ikki vunnið nakran dyst í ár, og heldur ikki í gjárkvøldið eydnaðist tað.

### Sjálvmálið

Jón Rói Jacobsen var við í hópinum, men hann var á beinkinum, meðan Súni Olsen var ikki við. Tað byrjaði væl hjá AaB, tí Jeppe Curth legði teir á odda 1-0 longu eftir 13 minuttir, og í fyrra hálvleiki var AaB greitt við yvirlutan.

Í seinna hálvleiki vendi myndin, og tá kom Randers meira fyri seg. Jón Rói Jacobsen var settur inn í verjuna eftir 71 minuttir, og tríggjar minuttir seinni hendi tað, sum ikki skuldi henda. Ein høgur bóltur varð sendur inn í brotsteigin, og í einum tøttum nærdysti millum Jón Róa Jacobsen, Michael Jacobsen og Karsten Johansen endaði tað við, at Michael Jacobsen rakti bóltin, og hann sveimaði fram við AaB-málmanninum og í egið netið til 1-1.

Hetta gjørdist eisini úrslitið av dystinum, og harvið var tað Randers, sum kom í finaluna, tí teir gjørdu mál á útivølli. Fyrri dysturin endaði málleysur.

Finalan ímillum Randers og Esbjerg verður spæld í Parkini Kristi Himmalferðardag.



*Jón Rói Jacobsen og liðfelagarnir komu ikki í donsku steypafinaluna, tí teir gjørdu sjálvmál seint í hálvfinaluni ímóti Randers*

## Aftur granna uppgerð í Gøtu

GÍ-NSÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at GÍ seinasta umfarið basti grannunum úr Fuglafirði, eru tað hesa ferð runavíkingar og NSÍ, sum koma í Sarpigerði. Ein dystur, sum plagar at vera ikki minni intensur og dramatiskur, enn uppgerðirnar móti ÍF mangan hava verið.

Og í Gøtu kunnu tey fegnast um, at allir spælarar tykjast vera tøkir. Eingi leikbann hótta liðið hesaferð, og skaðar hava tey enn ikki kent sviðan av í ár.

Tað hava tey hinvegin hjá NSÍ, har Helgi L. Petersen og Sjúrður Jacobsen framvegis ikki eru tøkir hjá venjaranum, Trygva Mortensen. Tað er Óli Hansen heldur ikki, men hetta kemst av, at hann er leikbannaður.

Á pappírinum eru verjuplássini tó tey, har NSÍ er best fyri, og tí eru møguleikararnir fyri vikarum í verjuni fleiri.

## formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1B36 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 13 |
| 2EB/S | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 12 |
| 3KÍ | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 10 | 5 | 5 | 11 |
| 4HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 10 |
| 5GÍ | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 10 |
| 6NSÍ | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 8 | 8 | 0 | 7 |
| 7Skála | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 8 | 5 | 3 | 5 |
| 8B68 | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 5 | 6 | -1 | 5 |
| 9ÍF | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 5 | 16 | -11 | 0 |
| 10VB/S | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 3 | 18 | -15 | 0 |

## 1. DEILD MENN

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1LÍF | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 9 | 1 | 8 | 13 |
| 2B71 | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 16 | 4 | 12 | 12 |
| 3AB | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 10 | 3 | 7 | 10 |
| 4SÍ | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 9 |
| 5FSV04 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 12 | 4 | 8 | 9 |
| 6TB | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 8 | 10 | -2 | 9 |
| 7HB | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 14 | 13 | 1 | 4 |
| 8KÍ | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 12 | 19 | -7 | 4 |
| 9VB/S | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 5 | 20 | -15 | 3 |
| 10Royn | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 1 | 21 | -20 | 0 |


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.